# Talvan niðanfyri greinar lestrarleistin nærri:

| | 2019/20 Ískoytisútbúgving | 2020/21 Masterskeið |
|---|---|---|
| Heyst | Vísindaástøði (5 ECTS)<br>Akademisk háttaløg við sjálvvaldum evni (10 ECTS) | Yvirskipað námsfrøðilig leiðsla (15 ECTS) |
| Vár | Akademisk háttaløg við sjálvvaldum evni (framhald)<br>Bachelorritgerð (15 ECTS) | *Antin*: Leiðsla av námsfrøðiligum arbeiði í dagstovna- og serstovnaøkinum (15 ECTS<br>*Ella*: Leiðsla av undirvísing í skúlaøkinum (15 ECTS) |

**Kostnaður**
Ískoytisútbúgvingin kostar 8000 kr. fyri hvørt skeiðið (tilsamans 30 ECTS fyri 24.000 kr.), meðan skeiðini á masterstigi kosta 15.000 kr. hvørt. (tilsamans 30 ECTS fyri 30.000 kr.)

Talvan niðanfyri greinar kostnaðin fyri hvørt fíggjarár fyri hvønn lesandi:

| | **2019** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|---|
| Lesandi við "gomlu útbúgvingini" | 16.000 kr. | 23.000 kr. | 15.000 kr. |
| Lesandi við BEd prógvi | 0 kr. | 15.000 kr. | 15.000 kr. |

**<u>Bacheloruppstiganarútbúgving</u>**
- Vísindaástøði (5 ECTS)
- Akademisk háttaløg við sjálvvaldum evni (10 ECTS)
- Bacelorritgerð (15 ECTS)

Tey sum taka leiðaraútbúgving skriva innan námsfrøðiliga leiðsluøkið bæði til sjálvvalda evni í skeiðnum "Akademisk háttaløg", og til Bachelorritgerðina. Fakfólk innan námsfrøðiliga leiðslu vegleiða.

**<u>Skeið á masterstøði</u>**
I: Yvirskipað námsfrøðilig leiðsla (15 ECTS)

IIA: Leiðsla av námsfrøðiligum arbeiði á dagstovna- og serstovnaøkinum (15 ECTS)
IIB: Leiðsla av undirvísing á skúlaøkinum (15 ECTS)

Øll taka skeið I: Yvirskipað námsfrøðilig leiðsla, og velja síðan antin IIA (Leiðsla av námsfrøðiligum arbeiði á dagstovna- og serstovnaøkinum) ella IIB (Leiðsla av undirvísing á skúlaøkinum), alt eftir starvsøki.

## Upprit til lýsingar av masterskeiðunum

### <u>I: Yvirskipað námsfrøðilig leiðsla (15 ECTS)</u>

**Endamál:**

Í fyrsta lagi er endamálið, at hin lesandi skal duga at greiða frá og kritiskt viðgera innan- og uttanhýsis kontekstin, sum ein leiðsla virkar í, innan skúla- og námsfrøðiliga øki. Í øðrum lagi er endamálið, at hin lesandi gerst varur við, hvørji høvuðsmál eru áleikandi í okkara samtíð innan leiðslu í dagstovnum, frítíðarskúlum, serstovnum, skúlum o.l.

**Innihald:**
Kontekstur hjá námsfrøðiligum stovnum og skúlum í føroyska nútíðarsamfelagnum: seinmodernitetur, globalisering, nútíðargerðin av almennum tænastum og avbjóðingar og møguleikar í einum mikrosamfelag.

Leiðsla innan námsfrøðiliga økið: Námsfrøðilig leiðsla, fyrisitingarlig leiðsla, strategisk leiðsla og starvsfólkaleiðsla. Leiðsla av starvsfólki sum einstaklingar, toymir og sum ein starvsfólkahópur.

Í øllum førum verður tilgongdin at lýsa, greiða og greina omanfyrinevndu øki sum hugtøk, fyribrigdir og ástøðir við kjølfesti í granskingargrundaðum tilfari.

**Læruúrtøkur:**
Tá skeiðið er lokið, skal hin lesandi:

- Duga at handfara støður í gerandisdegnum, sum standast av seinmoderniteti og globalisering
- Duga at greiða og greina hvussu nútíðargerð av almennum tænastum ávirka starvsfólk og viðskiftafólk innan dagstovna-, serstovna- og skúlaøki
- Megna at taka atlit til og professionelt leiða støður, ið standast av kendleika í einum mikrosamfelagi
- Kenna aðaltættirnir í námsfrøðiligari leiðslu, starvsfólkaleiðslu, fyrisitingarligari og strategiskari leiðslu
- Megna at seta orð á hvussu ráðgeving, reflektión, eftirmeting og líknandi kann verða nýtt í leiðsluni av undirvísing og námsfrøðiligum arbeiði í skúlum, dagstovnum, frítíðarskúlum, serstovnum o.l.
- Taka atlit til, hvussu ein leiðari eigur at sýna umhugsni viðvíkjandi sínum starvsfólki, tá leiðsluavgerðir verða tiknar

**Læru- og undirvísingarhættir:**

Sjálvlestur, fyrilestrar, bólkaarbeiðir, framløgur frá lesandi við eftirfylgjandi kjaki, og ymsar leiðsluvenjingar t.d. feltarbeiði og eygleiðingar við feedback og sparring.

**Próvtøkuhættir (ikki fastlagt enn):**
Skift verður ímillum spurdómsstýrdar uppgávur við munnligari verju, portfolio, essay, synopsis og munnligar próvtøkur við ókendum spurningi.

## IIA: Leiðsla av námsfrøðiligum arbeiði á dagstovna- og serstovnaøkinum (15 ECTS)

**Endamál**:
Endamálið er, at tey lesandi skulu fáa ástøðiliga og verkliga vitan um leiðslu av námsfrøðiliga arbeiðinum, ið ein dagstovna-/serstovnaleiðari fremur saman við sínum starvsfólkum. Námsfrøðiliga arbeiði skal leiðast soleiðis at barnið/borgarin mennist á fullgóðan hátt í treysti til sín sjálvs, eins og til felagsskapin.

**Innihald**:
Leiðsla av dagstovninum og serstovninum sum kjarnutilboð í vælferðarsamfelagum.
Leiðsla av einum námsfrøðiligum umhvørvi í dagstovni og serstovni, har førleikamenning og professsionalisering av starvsfólkum eru aðaltættir.

**Læruúrtøkur**:
Tá skeiðið er lokið, skal hin lesandi megna at:

- Leiða strategiskt, so tey bestu og mest framkomnu námsfrøðiligu og sernámsfrøðiligu tilboðini eru tøk, og so borgararnir fáa tryggar lívsumstøður og eitt gott sjálvstøðugt lív
- Leiða soleiðis, at dupultsosialisering fer fram á skynsaman hátt, har stovnar og avvarðandi sínámillum samstarva
- Í gerandisdegnum at leiða soleiðis, at relatiónsførleikin hjá starvsfólki er dygdargóður í mun til einstaklingin, ið tey professionelt vara av
- Leiða barnagarðin/serstovnin sum eina lærandi organisatión
- Leiða soleiðis, at námsfrøðiligu stevnumiðini verða útint í verki í gerandisdegnum
- Leiða í samband við tvørprofessionelt samstarv
- Leiða samstarv millum námsfrøðingar og hjálparfólk

**Læru- og undirvísingarhættir:**
Sjálvlestur, fyrilestrar, bólkaarbeiðir, framløgur frá lesandi við eftirfylgjandi kjaki, og ymsar leiðsluvenjingar t.d. feltarbeiði og eygleiðingar við feedback og sparring.

**Próvtøkuhættir (ikki fastlagt enn):**
Skift verður ímillum spurdómsstýrdar uppgávur við munnligari verju, portfolio, essay, synopsis og munnligar próvtøkur við ókendum spurningi.

## IIB. Leiðsla av undirvísing á skúlaøkinum (15 ECTS)

**Endamál**:
Endamálið er, at tey lesandi læra at leiða undirvísing í skúlanum, soleiðis at næmingurin fakligt og sosialt er til reiðar at taka lut í bæði í samfelagnum í dag og í framtíðar samfelagnum.

**Innihald**:
At samantvinna leiðslu og læring, soleiðis at lærarar eru førir fyri á besta hátt at fyrireika, fremja og eftirmeta undirvísing.

**Læruúrtøkur**:
Tá skeiðið er lokið, skal hin lesandi megna at:

- Leiða í mun til læruúrtøkur hjá næmingum
- Leiða soleiðis at professionelli kapitalurin hjá starvsfólkunum verður hildin við líka og veksur
- Leiða undirvísing í ávikavist náttúruvísindaligum, samfelagsligum, hugvísindaligum og kreativum fakum
- Rudda slóð, soleiðis at lærarar sum einstaklingar og sum limir í einum lærarateymi hava atgongd at ogna sær ástøðiligar og verkligar førleikar í samband við floksleiðslu

- Leiða eitt umhvørvið, har lærari og næmingur hava umstøður at knýta professionellar og persónligar relatiónir í samband við læring og dannilsi
- Leiða soleiðis, at lærarin kennir seg stimbraðan til at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum

**Læru- og undirvísingarhættir:**
Sjálvlestur, fyrilestrar, bólkaarbeiðir, framløgur frá lesandi við eftirfylgjandi kjaki, og ymsar leiðsluvenjingar t.d. feltarbeiði og eygleiðingar við feedback og sparring.

**Próvtøkuhættir (ikki fastlagt enn):**
Skift verður ímillum spurdómsstýrdar uppgávur við munnligari verju, portfolio, essay, synopsis og munnligar próvtøkur við ókendum spurningi.

# Skeiðslýsingar fyri ískoytisútbúgvingina

| **Vísindaástøði - ískoytisútbúgvingin** | |
|---|---|
| ECTS: | 5 |
| Lestrarlisti: | Lestrarlisti verður útflýggjaður við skeiðsbyrjan |
| Próvdøming: | Innanhýsis |
| Próvtalsstigi: | Staðið/ikki staðið |
| Stig: | Bachelor |
| Endamál: | Endamálið við skeiðnum er at geva tí lesandi grundleggjandi vitan um tey vísindaástøði og ta heimspeki, sum eru grundarlagið undir dagsins námsfrøðiligum og lærufrøðiligum virksemi. |
| Innihald: | • Søguligt yvirlit yvir vísindaástøði, við denti á evropeiska vísindasøgu<br>• Hvat er vísindaástøði?<br>• Grundleggjandi hugtøk í vísindaástøði<br>• Positivisma<br>• Kritisk rationalisma og paradigmuástøði<br>• Tulkingarfrøði<br>• Fyribrigdarfrøði<br>• Kognitiv og sosial konstruktivisma<br>• Kritisk ástøði<br>• Postmodernaði ástøði |
| Læru- og undirvísingarhættir: | Undirvísingin er skipað sum fyrilestrar, samrøður, bólkaarbeiði, venjingar |
| Próvtøka: | Skrivlig roynd. Nærri verður greitt frá próvtøkuni á skeiðinum. |
| Læruúrtøkur: | Tá skeiðið er lokið, skulu tey lesandi duga at<br>• greiða frá grundleggjandi vísindaástøðiligum hugtøkum<br>• seta námsfrøði inn í ein vísindasøguligan samanhang<br>• greiða frá, samanbera og brúka ymiskar vísindaástøðiligar stevnur í einum námsfrøðiligum høpi |
| Ábyrgd: | |

**Undirvísingardagar: Vísindaástøði**

| Vika nr. | Dagur | Klokkan |
|---|---|---|
| Nr. 35 | Fríggjadagur 30. August | 14-17 |
| | Leygardagur 31. August | 10-14 |
| Nr. 37 | Fríggjadagur 13. September | 14-17 |
| | Leygardagur 14. September | 10-14 |
| Nr. 39 | Fríggjadagur 27. September | 14-17 |
| | Leygardagur 28. September | 10-14 |
| Nr. 41 | Fríggjadagur 11. Oktober | 14-17 |
| | Leygardagur 12. Oktober | 10-14 |

| **Akademisk háttaløg við sjálvvaldum evni - ískoytisútbúgvingin** | |
|---|---|
| ECTS: | 10 |
| Lestrarlisti: | Verður útflýggjaður við skeiðsbyrjan |
| Próvdøming: | Uttanhýsis |
| Próvtalsstigi: | 7-talsstigin |
| Stig: | Bachelor |

| | |
|---|---|
| Endamál: | Endamálið við skeiðnum er at geva tí lesandi grundleggjandi vitan um tey vísindaligu háttaløg, sum eru grundarlagið undir dagsins námsfrøðiligum og lærufrøðiligum virksemi. |
| Innihald: | • Innlit í tey vanligastu kvalitativu og kvantitativu háttaløgini (herundir lýsandi hagfrøði), og hvat tilknýti hesi hava til tær vísindateoretisku stevnurnar<br>• Innleiðsla í lestrarførleika og fróðskaparhegni (akademiskum hándverki)<br>• Efeingi og aðrar bókasavnstænastur<br>• Tilvísingar<br>• Akademisk skriving<br>• Námsfrøðilig dokumentasjón<br>• Aktion research<br>• Sjálvvalt evni lýst við akademiskum háttaløgum |
| Læru- og undirvísingarhættir: | Undirvísingin er skipað sum fyrilestrar, samrøður, bólkaarbeiði, venjingar og sjálvstøðug uppgávuskriving |
| Próvtøka: | Skrivlig uppgáva. Nærri uppgávulýsing í serstøkum skjali. |
| Læruúrtøkur: | Tá skeiðið er lokið, skulu tey lesandi duga at<br>• lýsa grundleggjandi tættir í kvantitativum og kvalitativum háttaløgum, og greiða frá møguleikunum og avmarkingunum í hesum háttaløgum<br>• Duga at greiða frá og hugleiða um tilknýti millum vísindaligu stevnurnar og háttaløg<br>• Duga sjálvstøðugt at leggja sín lestur til rættis og duga grundleggjandi akademiskt handverk |

**Undirvísingardagar: Akademisk háttaløg**

| Vika nr. | Dagur | Klokkan |
|---|---|---|
| Nr. 44 | Fríggjadagur 1. november | 14-17 |
| | Leygardagur 2. november | 10-14 |
| Nr. 47 | Fríggjadagur 22. november | 14-17 |
| | Leygardagur 23. november | 10-14 |
| Nr. 50 | Fríggjadagur 13. desember | 14-17 |
| | Leygardagur 14. desember | 10-14 |
| Undirvísingin í 2020 verður innan sjálvvalt evni, við avtalaðari vegleiðing. Møtt verður eisini nakrar dagar. | | |

| **BEd ritgerð - ískoytisútbúgvingin** | |
|---|---|
| ECTS: | 15 |
| Lestrarlisti: | Umframt tað tilfar sum er brúkt í lesnaðinum frammanundan, verður roknað við at tann lesandi sjálv/ur finnur fram hóskandi tilfar |
| Próvdøming: | Uttanhýsis |
| Próvtalsstigi: | 7-talsstigin |
| Stig: | Bachelor |
| Endamál: | Verkætlanin verður framd samsvarandi endamálunum fyri útbúgving til B.Ed., antin innan fólkaskúlalærarayrkið ella námsfrøðingaayrkið, og skal vera á slíkum støði, at hon verður viðurkend sum grundarlag undir framhaldslestri til diplom ella MA, bæði í Føroyum og uttanlands. Bachelorverkætlanin er ein ritgerð og ein munnlig próvtøka. Verkætlanin hevur heimild í §§ 10-11 í Kunngerð um útbúgving av fólkaskúlalærarum og námsfrøðingum frá 30. november 2009. |

| | |
|---|---|
| Innihald: | Í samráði við vegleiðararnar velja tey lesandi sjálv eitt evni innan ávikavist undirvísingarligu – ella námsfrøðiligu fakøkini. Verkætlanin skal verða skipað kring ein spurning/spurdóm, sum skapar karm um ritgerðina, ið avmarkar valmøguleikarnar viðvíkjandi ástøði, hugtøkum, háttalagi og kanningarúrslitum.Til tess at verða góðkent skal valda evnið hava týdning og vera viðkomandi fyri avvarðandi fakøki. Vegleiðararnir skulu í samráði við undirvísingarleiðararnar á Námsvísindadeildini góðkenna evnið. |
| Læru- og undirvísingarhættir: | Vegleiðing í 4 tímar |
| Próvtøka: | Bachelorverkætlanin endar við munnligari próvtøku, sum hevur sítt støði í einum skrivligari ritgerð. Próvtøkan er nærri lýst í serstøkum skjali. |
| Læruúrtøkur: | Tá skeiðið er lokið, skulu tey lesandi duga at<br>• vísa síni evni at nýta vísindalig ástøði og háttaløg til at viðgera og greina eitt ávíst evni innan ávikavist lærara- ella námsfrøðingayrkið<br>• duga at seta einstøku partarnar í ritgerðini í størri høpi og heild og skipa eina sjálvstøðuga viðgerð<br>• sýna, at hon/hann á virknan hátt megnar at finna, velja, og brúka viðkomandi heimildir, ið skapa eitt haldgott grundarlag undir viðgerð og greining |